# KÍ vann stórsigur í toppdystinum

**Tað vóru tey bæði fremstu liðini í kvinnudeildini, sum spældu á Argjum sunnudagin. Hóast AB fekk góða byrjan endaði tað við greiðum tapi ímóti KÍ**

1. DEILD KVINNUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*KÍ vann toppdystin í kvinnudeildini ímóti AB heili 7-2, og KÍ er nú væl frammanfyri hini liðini í deildini. Mynd: Norðlýsið*

Tað vóru bert trý stig á muni millum KÍ og AB undan toppdystinum teirra millum á Argjum sunnudagin. AB hevur fingið góð úrslit á heimavølli, meðan KÍ hevur vunnið onkran tepran sigur seinastu vikurnar.

Nakað av spenningi var tí um dystin, og hann gjørdist ikki minni, tá ið AB longu eftir tveir minuttir legði seg á odda 1-0. Men eftir hetta vendin gongdin fullkomiliga. KÍ svaraði aftur tveir minuttir seinni, fór fram um eftir 10 minuttir og skoraði trý mál afturat áðrenn hálvleik. AB minkaði til 5-2 beint fyri steðgin, men í seinna hálvleiki økti KÍ tvær og vann 7-2. Bæði liðini misnýttu harafturat brotsspark.

Málini hjá KÍ skutu Rannvá Andreasen 2, Vivian Bjartalíð, Bára S. Klakstein, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Maria Ziskason og eitt var sjálvmál. Málini hjá AB skutu Rannvá Poulsen og Rannvá Jarnskor.

## B36 fótaði sær

B36 raknaði viðaftur í kappingini, eftir at liðið hevði tapt tveir dystir á rað í lands- og steypakappingini. B36 spældi á heimavølli ímóti GÍ, sum er væl fyri í ár, og tað eydnaðist B36 at vinna dystin 2-0. Málini skutu Joan Simonsen og Ása Christiansen

EB/Streymur spældi á heimavølli ímóti NSÍ, og tann dystin vann heimaliðið 2-0. Maria í Brekkuni og Rakul Magnussen skoraðu málini.

Seinasti dysturin var í Sørvági, har HB var á vitjan. Heldur ikki hesaferð eydnaðist tað HB at fáa stig, tí SÍ vann dystin 2-0. Ruth Thomassen skoraði bæði málini.

asfalt

# LESARAKAPPING

FRÍGGJADAGUR 2. JUNI

| Kl.: | Útipallurin | Tjóðpallurin | Margarinfab. | Posthúsið | Hotel Tórshavn | Miðlahúsið |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 19:00 | | Poppkorn | Knút Háberg | Hanus G. Johansen | Unn Paturson | Magni Christiansen |
| 20:00 | | The Story Ends | Anytime | Tarira | Stanley Samuelsen | Lív Hansen |
| 21:00 | Lena | | | | | |
| 22:00 | Marius | | | | | |
| 23:00 | Makrel | | | | | |
| 00:00 | Side Effect | | | | | |
| 01:00 | | Eyðun Nolsøe Band | Ineptus | Stórbandittarnir | Safir | Eyðun Jacob-sens Band |
| 02:00 | | SIC | Villmenn | RoWan | Jazztrio | Deiggj |
| 03:00 | | Hatespeech | All That Rain | Rútmiska Kórið | Vágaverk | Spælimennirnir |

LEYGARDAGUR 3. JUNI

| Kl.: | Útipallurin | Tjóðpallurin | Margarinfab. | Posthúsið | Hotel Tórshavn | Miðlahúsið |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 15:00 | | DejaVu | Nanoscopic/ b-ter | Kamarkórið | Blue Town | Føroya Sving Ting |
| 16:00 | | Isadora & The Rebels | Crazy Mizz Daisy | Føroya Klarinettorkestur | Fagrir Fuglar | Terji og Føstufressar |
| 17:00 | | Lama Sea | Petur Háberg | Ung Stjørnuskot | Tjant | Pætur við Keldu |
| 18:00 | | Petur Pólson | Skunk | Kári Sverrison | Rókur | Anna Háberg |
| 19:00 | | Búi Dam | The Revenders | Cantabile | Tvey av kamarinum | Tinganest |
| 20:00 | Annika Hoydal | | | | | |
| 21:00 | Páll Finnur Páll | | | | | |
| 22:00 | Høgni Lisberg | | | | | |
| 23:00 | 200 | | | | | |

FØROYA BANKI · miðlahúsið í Vágsbotni · faroejet · TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**ASFALT-PAKKIN ER Á TREMUR VIÐ GÓÐUR VINNINGUM**

2 Asfalt deluxe atgongumerkir
2 Asfalt junior atgongumerkir
2 Asfalt t-shirt (vaksin)
2 Asfalt t-shirt (børn)
2 Asfalt brosjur
1 Gávubræv á 1000 kr frá Handilskjarnin
1 Gávubræv á 500 kr frá Pizzaria á HOTEL TÓRSHAVN
2 Atgongumerkir til Asfalt-eftirveitslu á Hotel Føroyum




**Svara hesum spurningi:**
Hvør bólkur á Asfalt fer á pall saman fyri fyrstu ferð síðani 1998?

**Títt svar:** ______________________

Les um bólkarnar á **www.asfalt.fo**

Send henda lepan til: Sosialin, boks 76, 110 Tórshavn áðrenn 22. mai og verð við í kappingini um ein ordans »ASFALT-PAKKA«
**Viðmerk á brævbjálvan: ASFALT**